# Big Band í Miðlahúsinum

**Herligur Big Band tónleikur verður at hoyra í Miðlahúsinum í týskvøldið, tá toppurin av føroyska Big Band umhvørvinum undirheldur**

KONSERT
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Konsertin í Miðlahúsinum við Skansa Big Band og Tórshavnar Stórband verður týskvøldið*

Í annaðkvøld, týskvøldið, verður konsert í Miðlahúsinum við tveimum føroyskum orkestrum. Talan er um Skansa Big bandið og Tórshavnar Stórband, vanliga nevnt Stórbandittarnir. Orkestrini hoyra til tónleikaumhvørvið hjá Tórshavnar Musikkskúla, og eru tey eftirhondini væl kend um alt landið.

Skansa Big Band er yngra orkestrið, har evnaríkir spælarar sleppa at royna seg. Orkestrið hevur ferðast nógv, bæði í Føroyum og aðrastaðni.

Serliga Stórbandittarnir hava víst, hvat ið tey vilja. Orkestrið skipaði fyri á leið trimum árum síðani fyri einari ógvuliga væleydnaðari verkkapping, sum samstundis var tann fyrsta av sínum slag í Føroyum. Orkestrið hevur luttikið á Asfalt tvey ár á rað, samstundis sum tað hevur luttikið í tí stóru evropeisku jólakonsertini, ið var send til yvir 15 mio. fólk seinasta ár. Sostatt er orkestrið tann føroyski bólkurin, sum hevur spælt fyri flest fólkum. Gjøgnum tíðina hevur orkestrið eisini fostrað fleiri ungar og sera dugnaligar tónleikarar, sum í dag gera seg galdandi bæði í og uttanfyri Føroyum. Orkestrið ætlar sær til Íslands og Grønlands komandi ár.

Til konsertina týskvøldið verður songfuglurin Anna Katrina Petersen solistur. Hon luttók við orkestrinum á sera væleydnaðu konsertini á Asfalt, og hevur síðani verið solistur til fleiri høvi. Ólavur Olsen, Eirikur Skála og Heðin Z. Davidsen eru dagligir leiðarar. Konsertin byrjar kl. 19.30 og kost-naðurin er 50 kr. fyri vaksin og ókeypis fyri børn.

# Fyrilestur um íløgumentan í Miðlahúsinum

**Hava útbúgving og kyn ávirkan á fíggjarligu íløgur okkara? Hvør dugir betur at spara upp til pensjón – menn ella kvinnur? Hvørjar útbúgvingar eru ein góð íløga? Og hvussu ávirkar útbúgvingin okkara fíggjarligu íløgur? Fyrilestur í Miðlahúsinum mikukvøldið.**



FYRILESTUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Mikukvøldið kl. 19 skipar Virðisbrævamarknaður Føroya fyri almennum fyrilestri um íløgumentan í Miðlahúsinum. Juanna Schrøter Joensen, Ph.D. í búskaparfrøði, fer í almennum fyrilestri at greiða frá, undir heitinum Íløgumenten – velja búskaparfrøðingar og konufólk øðrvísi?

### Øll kunnu fylgja við

Fyrilesturin er ætlaður øllum áhugaðum. Evnini fevna víða, og tað ber til hjá øllum at fylgja við, og høvi verður so avgjørt eisini at seta spurningar. Evnini, ið verða umrødd, verða dúgliga viðgjørd í miðlum í londunum kring okkum, og økti áhugin fyri partabrøvum í Føroyum hevur eisini elvt til nógv kjak um hesi evni. Ikki minst pensjónsuppsparing er vorðið til kjak evni millum manna. Mikukvøldið verður møguligt at fáa eitt væl skikkað íkast til kjakið og kanska koma tættari at nøkrum áhugaverdum sannroyndum.

### Kvinnur og íløgur nógv umrøtt

Juanna Schrøter Joensen er fyrsti føroyingur við Ph.D. í búskaparfrøði, og hon hevur í gransking sínari millum annað fingist við at greina, hvørja ávirkan kyn og útbúgving hava á fíggjarligar íløgur. Fríggjadagin vardi hon Ph.D. ritgerð sína við heitinum Determinants and Consequenses of Human Capital Investments á Århus Universitet. Serliga hava kanningarnar hjá Juannu um, hvørt lestrararbeiði hevur jaliga ávirkan á lestrartíðina fingið nógva umrøðu í donskum miðlum. Juanna Schrøter Joensen fer í komandi ári til Stokkhólm at arbeiða á lærda háskúlanum har.

Tiltakið er ókeypis, og tað er ætlað øllum áhugaðum. Eingin tilmelding er neyðug.

# Fólk eru fangað á fiskavirkjunum

**Arbeiðsfólk á fiskavirkjunum eru á nógvan hátt fangaði í skipanini, tí tey verða ikki søgd úr starvi, hóast einki arbeiði er í mánaðir.**

HEIMASÍÐUTÍÐINDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tá ið fiskavirkir ikki arbeiða vegna rávørutrot ella líknandi viðurskifti, ber til at fáa útgjald úr Fiskavirkisskipanini í 8 vikur út í eitt. Eftir 8 vikur fer persónurin úr skipanini og kann fáa úr ALS um viðkomandi er sagdur úr starvi. Hetta sigur samtakið Samtak, sum umboðar føroysk arbeiðarafeløg.

- Er eitt arbeiðsfólk ikki uppsagt á sínum arbeiðsplássi, so ber ikki til at fáa nakað útgjald úr ALS, hóast viðkomandi einki arbeiði hevur. Til ber sjálvandi at siga seg úr starvi og melda seg inn í ALS, men tá fer arbeiðsfólki í karantenu í 4 vikur, sigur Samtak á heimasíðu sínari.

Arbeiðarafeløgini siga seg fleiri ferðir hava gjørt vart við henda trupulleika, og spurningurin er, hvat gerast skal framyvir. Tað hevur higartil ikki eydnast at fáa inn í sáttmálan, at arbeiðsgevarar hava skyldu at siga fólk úr starvi, um arbeiði ikki er í longri tíðarskeið.

- Høvuðstrupulleikin við at fáa arbeiðsgevarar at siga fólki úr starvi vegna vantandi arbeiði er, at løn skal rindast í uppsagnartíðini. Hetta vilja ávísir arbeiðsgevarar ikki, tí eru starvsfólkini fangaði. Arbeiðarafeløgini arbeiða við at loysa henda trupulleika og heita á fólk at skifta arbeiði, sum koma út fyri slíkum.



*Samtak fýlist á, at arbeiðsfólk, sum ikki eru søgd úr starvi kunnu ikki fáa útgjald úr ALS, hóast viðkomandi einki arbeiði hevur*

# 150 lærarar á ráðstevnu um samvirknu talvuna

**Hósdagin í vikuni verður stór ráðstevna í Klaksvík um samvirknu talvuna innan skúlagátt**

HEIMASÍÐUTÍÐINDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ráðstevnan er ætlað lærarum í føroyska fólkaskúlanum. Ikki færri enn 150 lærarar hava teknað seg; umframt fólkaskúlalærarar, hava eisini lærarar og leiðslur við miðnámsskúlar í Føroyum teknað seg.

Endamálið við ráðstevnuni er at kunna fólkaskúlalærarar um nýtsluna av hesum teldutalvunum innan skúlagátt. Á ráðstevnuni fara umboð fyri Skúlabókagrunnin at greiða frá, hvørjum tey arbeiða við í samband við samvirknu talvuna. Umboð fyri KT- depilin vísir, hvussu samvirkna talvan kann nýtast til tónleikaundirvísing. Lærarar í Ósáskúlanum siga frá sínum royndum við talvuni. Umboð fyri Landsmiðstøðina hevur eina framløgu.

Susanne Andersen og Bak Jensen úr Danmark, greiða frá, hvussu tey undirvísa í ávikavist donskum og støddfrøði.

Tað eru Skúlin við Ósánna og Skúlin á Ziskatrøð, sum í samráð við Mentamálaráðið og Klaksvíkar kommunu skipa fyri ráðstevnuni um ta samvirknu talvuna – eisini kallað smartboard. Ráðstevnan verður í Skúlanum við Ósánna.

Hósdagin verður ráðstevnan frá klokkan 13.00 til umleið 16.00 og fríggjadagin frá klokkan 9.00.til

*Tað eru Skúlin við Ósánna og Skúlin á Ziskatrøð, sum í samráð við Mentamálaráðið og Klaksvíkar kommunu skipa fyri ráðstevnuni um ta samvirknu talvuna – eisini kallað smartboard. Ráðstevnan verður í Skúlanum við Ósánna*

